HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

2006.00578-10

AVRIT

# Góðkenning av innaneftirlitinum

## *Certificate of Approval of Own Check Programme*

Valhalla P/F, Toftir
***FO-445, Toftir***
***Faroe Islands***

Løggildingarnummar:
***Approval No.:***

119

Innaneftirlitið er góðkent av Heilsufrøðiligu starvsstovuni
***The Own Check Programme is approved by the Food, Veterinary and Environmental Agency***

Treytirnar, og tað góðkenningin fevnir um, er ásett
í kunngerð nr. 114 frá 15. august 2001 um innaneftirlit
***The inspection requirements covered by this Approval Certificate are stipulated in Regulation No. 114 on Own Check Programme, dated 15 August 2001***

Kunngerðin fremur artikkul 6 í ES direktivi 91/493/EEC um heilsufrøðilig krøv til framleiðslu og útflutning av fiski og fiskavørum. Innaneftirlitið byggir á HACCP-aðalreglurnar við vandamálsgreining og stýring av viðbreknum stýringarliðum
***Said regulation is promulgated in furtherance of Article 6 of Council Directive 91/493/EEC laying down the health conditions for and the placing on the market of fishery products. The Own Check Programme is based upon HAACP guidelines relating to the application of hazard analysis and critical control point systems***

Tórshavn, hin 05. juli 2006

Óluva Niclasen
deildarleiðari
***Department Manager***

/

Laila S. Jacobsen
skoðanarleiðari
***Lead Quality Auditor***

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

AVRIT

2006 00578-10

Valhalla P/F, Toftir
FO-445 Toftir

Tórshavn, hin 05. juli 2006
Málnr.: 4100-200000886-32
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: LSJ / Tlf.: 35 64 19

**Matvørudeildin**

Góðkenning av innaneftirlitinum
Valhalla P/F, Toftir, 119

## 1. Heimild

Sambært grein 4 í kunngerð 114 frá 15. august 2001 um innaneftirlit skal innaneftirlitið góðkennast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 2. Innkalling av tilfari

Heilsufrøðiliga starvsstovan innkallaði tilfar úr góðskuhándbókini, í skrivi dagfest 30. september 2004. Valhalla P/F, Toftir sendi tilfar inn er tað móttikið í tíðarskeiðnum 25. oktober 2004 til 4. apríl 2006

## 3. Skoðan

Grundarlagið undir skoðani er, umframt innkallaða tilfarið, reglurnar, sum eru galdandi á økinum, saman við góðskuhondbókini, arbeiðsgongdin og útfylt skjøl á virkinum. Víst verður serliga til hesi skjøl:

- Kunngerð nr. 114 frá 15. august 2001 um innaneftirlit
- Matvørulógin, løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985, um matvørur og kunngerðir við heimild í henni.

Í skoðanini er dentur lagdur á, um tey skoðaðu økini lúka krøvini í omanfyrinevndu lóg og kunngerðum, um samsvar er millum innaneftirlitið og arbeiðsgongdina á virkinum, og um tey viðurskifti, sum skulu skjalprógvast, verða skjalprógvað.

Skoðanin byggir á staksýnir av hesum økjum í innaneftirlitinum:

1. Innanhýsis skoðan
2. Lýsing av fyritøkubygnaði
3. Ábyrgd og heimildir
4. Vørulýsingar
5. Flóðkort fyri hvønn liðugvørubólk
6. Vandamálsgreining
7. Stýring av viðbreknum stýringarliðum
8. Avrit av øllum skjølum, við tilknýti til hvønn einstakan viðbreknan stýringarlið
9. Stýring av vatngóðskuni
10. Stýring av viðlíkahaldi av bygningi, maskinum, tólum, amboðum og uttanumøki
11. FRA-skjøl teir síðstu 6 mánaðirnar
12. Oyðublað (hjálagt hesum brævi til virkið at krossa av á og senda Heilsufrøðiligu starvsstovuni)
13. Yvirlit yvir almennar reglur
14. Sjálvrøkt
15. Heilsustøðan hjá starvsfólki
16. Handfaring, merking, goymsla og flutningur av fiski og fiskavørum

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax. +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Úrslitini av skoðanini eru skoðanarfrágreiðingini frá 7. apríl 2006, málnr. 200000886 og akt 23.

## 4. Rætting av FRA-skjølum

Í skoðanarfrágreiðingini varð boðað frá, at innaneftirlitsskipanin kundi góðskennast, tá ið frávikini staðfest við skoðanini vóru rættað. Í skrivinum varð álagt virkinum at fremja rættandi atgerðir av frávikum, sum vórðu staðfest undir skoðanini.

Tær rættandi atgerðirnar vóru framdar í tíðarskeiðnum 27. apríl til 21. juni 2006.

Heilsufrøðiliga starvsstovan uppfylgdi og góðkendi tær rættandi atgerðirnar í tíðarskeiðnum 16. mai 2006.

## 5. Góðkenning av innaneftirlitinum

Sagt verður frá, at innaneftirlitið á Valhalla P/F, Toftir, er góðkent.

## 6. Treytir

Virkið hevur skyldu til framhaldandi at halda innaneftirlitsskipanina við líka. Tá ið reglurnar fyri innaneftirlitið verða broyttar, ella tá ið framleiðslan á virkinum verður broytt, skal innaneftirlitið broytast samsvarandi.

Tórshavn, hin 05. juli 2006

Óluva Niclasen
deildarleiðari

/

Laila S. Jacobsen
skoðanarleiðari

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

2006-00578-6

Tórshavn, hin 09. februar 2004
Málnr.: 4100-200000515-25
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: JA / TLF 35 64 14

Valhalla P/F, Toftir
FO-650 TOFTIR

**Víðkan av løggilding**

Valhalla hevur sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni umsókn, dagfest 27. november 2003, um víðkan av løggildingini til eisini at umfata flakaframleiðslu.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt av at víðka løggildingina hjá Valhalla soleiðis, at hon eisini fevnir um framleiðslu av flaki.**

Sambært telefaxi frá 3. desember 2003 skuldu ymisk krøv verða lokin innan 2. februar 2004. Vitjað var á virkinum tann 4. februar 2004, har umstøðurnar vóru skoðaðar, og var staðfest tá, at krøvini vóru uppfylgd.

Víst verður annars til treytirnar í upprunaligu løggildingini frá 25. juli 2000, mál nr. 4102-000515-11.

**Kæra**
Sambært grein 46 í matvørulógini kunnu avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni kærast til Føroya landsstýri. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, tilvirkarin er kunnaður um avgerðina. Um kært verður, skal kæran sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Vinarliga

Dánjal Klein Christiansen
deildarleiðari

Óluva Niclasen
málsviðgeri

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax. +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA
STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# LØGGILDING

## Valhalla, Toftir

Løggildingarnummar: 119

er við heimild í grein 30 í løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m. og kunngerð nr. 122 frá 24. august 2001, sum broytt við kunngerð nr. 54 frá 19. apríl 2002 um viðgerð, keyp og sølu v.m. av fiski og fiskavørum á landi, løggildað av Heilsufrøðiligu starvsstovuni til hesar framleiðslur:

- Pakking av heilum og avhøvdaðum, ísaðum fiski
- Framleiðslu av feskum fløkum

Løggildingin er treytað av ásetingunum í matvørulógini, teimum í lógini heimilaðu kunngerðunum og teimum heimilaðu krøvunum, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur sett fyri at løggilda virki.

Hendan løggilding var upprunaliga veitt virkinum hin 25. juli 2000 sambært skrivi til virkið dagfest sama dag.

Tórshavn, hin 9. februar 2004

Dánial Klein Christiansen
deildarleiðari

Óluva Niclasen
málsviðgeri

HEILSUFRØÐILIGA

STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# LØGGILDING

## Vallhalla P/F, Toftir

**Løggildingarnummar: 119**

er við heimild í §30 í løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m. løggildað av Heilsufrøðiligu starvsstovuni til hesar framleiðslur:

- Pakking av heilum og avhøvdaðum ísaðum fiski

Løggildingin er treytað av ásetingunum í matvørulógini, teimum í lógini heimilaðu kunngerðunum og teimum heimilaðu krøvunum, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur sett fyri at løggilda virkið.

Tórshavn, hin 25. juli 2000

Bárður Enni
stjóri

Ásmundur Guðjónsson
deildarleiðari

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

2

2006-00578-11

Tórshavn, hin 25. juli 2000
Málnr.: ~~4102-00515-11~~
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: DKC

Valhalla P/F
Niðaragøta 76
FO-188 Hoyvík

# LØGGILDING AV P/F Vallhalla, Toftir

Sambært grein 30 í løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 skal løggilding fáast til vega frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni til virking av fiski og fiskaúrdrátti.

## Umsóknin

P/F Vallhalla hevur sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni umsókn um løggilding, dagfest 27. apríl 2000, við hjáløgdum tekningum.

Síðani hevur verið samskifti um umsóknina (verkætlanina), har fortreytirnar eru broyttar og fleiri upplýsingar fingnar til vega. Víst verður til hetta tilfar í málinum:

1. Umsókn um løggilding dagfest 27. apríl 2000 (HS. Mál.nr. 000515-1)
2. Eftirlitsblað dagfest 2. juni 2000(HS. Mál nr. 000515-2)
3. Eftirlitsblað dagfest 7. juni 2000(HS. Mál nr. 000515-4)

P/F Vallhalla er tilvirkari í bygningi, sum er leigaður frá eigaranum P/F Regn av virkinum.

P/F Vallhalla søkir um løggilding til fylgjandi framleiðslur:

- Pakking feskum heilum og avhøvdaðum ísaðum fiski

+ Flak sí 2006 00578-6

## Málsviðgerð

Grundarlagið undir málsviðgerðini eru, umframt umsóknina, reglurnar, sum eru galdandi á økinum saman við eini kanning av virkinum. Víst verður serliga til hesi skjøl:

1. Meginreglur um løggilding av fiskavirkjum (01.07.1994)
2. "ES-Góðkenning", Vegleiðing (FVD.03.1996)

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. +298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á, í hvønn mun tey heilsufrøðiligu viðurskiftini á virkinum eru tryggjandi. Hugt er eftir, hvussu virkið er innrættað, hvussu framleiðslan er løgd til rættis, hvat tilfar er brúkt til veggir, gólv o.s.fr. Somuleiðis er kannað, um útbúnaðurin til tað persónliga reinførið er nøktandi.

## Løggilding

Sagt verður frá, at P/F Vallhalla við hesum verður løggildað. P/F Vallhalla fær tillutað **løggildingarnummarið: 119**

Løggilding verður veitt til hesar framleiðslur:

- Pakking av feskum heilum og avhøvdaðum ísaðum fiski

Umframt nevndu framleiðslur verður fylgjandi virksemi á virkinum:

- Goymsla av kølivørum

Fyrivarni verður tikið fyri eyka krøvum í sambandi við góðkenning av framleiðsluútbúnað

Løggildingin kann verða endurskoðað, tá fimm ár eru liðin.

Løggildingin er givin við fylgjandi treytum.

## Almennar treytir

Virkið (bygningur, innbúgv, tól og amboð) skal altíð verða hildið í góðum standi og lúka krøvini í "Meginreglur um løggilding av fiskavirkjum" og "ES-Góðkenning, Vegleiðing".

Leiðslan skal syrgja fyri, at krøvini til ymiskar mannagongdir á virkinum, sum nevnd eru í "ES-Góðkenning, Vegleiðing", til dømis innan reinhald, sjálvrøkt, heilsufrøðiligt arbeiðslag í virking og á goymslu, verða hildnar.

Verða reglurnar um løggilding broyttar av landsstýrinum í hesum fimm ára tíðarskeiði, verður løggildingin møguliga endurskoðað í mun til broyttu reglurnar.

## Serligar treytir

Løggildingin er somuleiðis treytað av kravinum um innaneftirlit í fylgiskjali 1.
Løggildingin er somuleiðis treytað av, at P/F Vallhalla fær gjørt bakteriologiskar og evnafrøðiligar kanningar av vatni og reingerð, sum standa í fylgiskjali 2.

Sambært grein 35, 2. stk í matvørulógini skal nýggj løggilding fáast tá:

- eigaraskifti fer fram av bygninginum ella um framleiðarin skiftir virkisbygning
- munandi broytingar verða gjørdar av bygninginum
- munandi broytingar verða gjørdar av innrættingini av virkinum
- munandi broytingar verða gjørdar í framleiðslu ella vøruúrvali hjá virkinum.

## Kæra

Sambært grein 46 í matvørulógini kunnu avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni kærast til Føroya Landsstýri. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, tilvirkarin er kunnaður um avgerðina. Um kært verður, skal kæran sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Tórshavn, hin 25. juli 2000

Bárður Enni
stjóri

Ásmundur Guðjónsson
deildarleiðari

# FYLGISKJAL 1

## Innaneftirlit

Innan 1. november 2000 skal virkið hava sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni skikkaða umsókn um góðkenning av innaneftirlitinum hjá virkinum.

# FYLGISKJAL 2

Við heimild í grein 31 í matvørulógini hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan avgjørt, at tilvirkarin skal gera bakteriologiskar og evnafrøðiligar kanningar av vatninum og reingerðini á virkinum.

## Kanningar av vatni

Hesar skulu gerast sambært"EU-góðkenning, Vegleiðing", bæði hvat viðvíkir títtleika og slag av greiningum.

## Kanningar av reingerð/sóttreinsing

Kontaktplátukanningar ella svaberroyndir skulu somuleiðis gerast hvønn ársfjóring. Fyrstu ferð 4. ársfjóring ár 2000.

Virkið velur sjálvt út støðini, sum kannast skulu (hóskandi umleið 10 støð hvørja ferð).